

*Føroya Tele verður millum teirra, sum stuðla tiltakinum. Poul Henrik Poulsen, marknaðarleiðari á Føroya Tele og Rani Nolsøe frá Talvsambandinum*

# Heimselitan til Føroya

*Í heyst verður stór talvkapping hildin í Føroyum, har fleiri av heimsins fremstu telvarum fara at vitja oyggjar okkara*

JÁKUP MØRK

Talvsamband Føroya hevur seinastu tíðina arbeitt við ætlanum um at fyriskipað størsta talvtiltak nakrantíð her á landi.

Enn er ikki komið á mál í hesum sambandi, langt ífrá, men kortini liggur longu nú fast, at í hvussu so er nakrar av stóru kanónunum verða við, tá kappingin fer av barkastokki.

Rani Nolsøe heur váttað fyri Sosialinum, at teir í løtuni arbeiða við málinum, og at tað longu nú kann staðfestast, at kappingin verður í oktober mánaði í ár.

Júst hvørjir luttakararnir verða, er enn ikki endaliga greitt, men alt hetta verður almenningurin kunnaður um hin 15. apríl, tá luttakaralistin er greiður.

### Skelkaði heimin

Millum annað er longu nú staðfest at einans 14 Irina Krush, sum hevur skakað allan talvheimin, verður millum luttakararnar.

Tá størsta hendingin á alnetinum higartil, ein talvdystur millum Gary Kasparov og restina av heiminum, varð hildið fyri stuttum, var eitt sonevnt panel, sum skuldi taka støðu til leikirnar hjá heiminum.

Irina var tá í hesum paneli, og m.a. kom hon við einum spildurnýggjum leiki, í einari annars vælkendari støðu. Móti endanum av talvinum hevði hon hug at gera ein leik, sum, skuldi tað seinni vísa seg, hevði givið remis, men hon var niðurstemmað av panelinum, og úrslitið varð at heimsmeistarin, Kasparov, vann talvið.

Fleiri í talvheiminum eru nú farin at ivast í, um 14 ára gamla sensatiónin úr USA verður leikarin, sum fer at koppa Kasparov av alheims trúnuni.

Eisini er longu staðfest, at bretin, Nigel Short, sum í 1993 telvaði um heimsmeistaraheitið móti Kasparov, kemur hendavegin í heyst. Short vísti longu áhuga, eftir at Talvsambandið í 1997 skipaði fyri størstu kappingini higartil, og hesu ferð játtaði hann beinan vegin at luttaka.

Hvørji onnur nøvn verða við í kappingini er enn ikki avgreitt, men ivaleyst verður talan um nógv kend andlit, bæði í altjóða og í norðurlendskum høpi.

### Ikki bíligt

At skipa fyri slíkum tiltakið er sjálvsagt alt annað enn bíligt, so í løtuni eru teir í talvsambandinum eisini í ferð við at fáa fíggjarligu karmarnar í rættlag.

Júst hvørjir stuðlarnir verða, er ikki greitt enn, men sum Sosialurin skilur á lagnum, er í øllum førum greitt, at Føroya Tele verður millum teirra, sum stuðla tiltakinum.

Seinast talvsambandið skipaði fyri nøkrum, ið kemur nærhendis hesum, var í 1997, tá stór kapping varð hildin.

Tað ferðina fekk Talvsambandi øgiliga positivar afturmeldingar úr umheiminum, og ivast teir ikki í, at tiltakið hesu ferð verður eins væl eydnað.

# Sjónvarpið hevur ikki kunnað fylgt við

*– Ein kann ikki gera ta niðurstøðu, at Sjónvarpið ikki hevði komið í trupulleikar, um fíggjarstjórin ikki var farin í farloyvi, stendur m.a. í frágreiðingini hjá Grannskoðarafelagnum Rasmussen&Weihe*

ÓLAVUR Í BEITI

– Um vit samanbera stýringina av Sjónvarpinum við eitt partafelag, so er ein av mununum, at í einum partafelag er umframt stjórn eisini ein nevnd. Ein av teimum týdningarmiklu uppgávunum hjá nevndini er, at virka sum »sparringspartnari« hjá stjórnini, tá broytingar skulu gerast á einum virki, herundir at vera við í avgerðini um, hvussu stórar broytingar skulu fremjast.

– Stjórnin í Sjónvarpi Føroya hevur beinleiðis tilvísing til mentamálaráðharran, og sostatt hevur stjórnin í Sjónvarpi Føroya ikki á sama hátt sum stjórnin í einum partafelagi eitt »forum« har hugsanir kunnu verða royndar, áðrenn tær verða settar í verk. Í hesum sambandi kundi verið umhugsað, um tað er møguligt at skapa eitt líknandi »forum«, har stjórnin í Sjónvarpinum fær møguleikar at royna sínar hugsanir.

– Ein tílík »nevnd« hevði eisini kunnað stuðlað uppundir, tá strategisk mál skulu umhugsast og roynast, verður sagt í frágreiðingini hjá Grannskoðarafelagnum Rasmussen&Weihe.

### Lønarposturin ovurstórur

Frágreiðingin, sum Signar á Brúnni, mentamálaráðharri hevur fingið, viðgerð fíggjarligu trupulleikarnar hjá Sjónvarpinum í 1998 og 1999, og hitt evni er ein meting av dygdini í fíggjarstýringini og fíggjarligu stýringsamboðunum hjá Sjónvarpinum.

Men nevnt verður eisini í frágreiðingini hjá Rasmussen&Weihe, at gjøgnunumgongdin av roknskapinum hjá grannskoðarafelagnum vísir, at størsti útreiðsliposturin er lønir. Eisini sæst, at í krónum veksur eingin útreiðslupostur so nógv í tíðarskeiðinum 1996 til 1999 sum lønirnar.

– Vøksturin í lønum hevur verið stórur - bæði í yvirtíð og føstum lønum og skoytast kann uppí, at fyri føstu lønirnar er tað galdandi, at ein niðurskurður hevur rúma tíð um at sláa ígjøgnum. Yvirtíðin, sum nærum tvífaldast frá 1996 til 1997, vaks eisini í 1998. Við vøkstrinum frá 1996 til 1997 á lønarøkinum í huga, er tað okkara uppfatan, at royndir áttu at verið gjørdar á tálmað yvirtíðini longu tíðliga í 1998, verður sagt í frágreiðingini hjá Rasmussen&Weihe sum vit fara at hyggja neyvari eftir seinni.

# Innbrotini økjast

*Talið av innbrotum er sambært ársfrágreiðingini hjá løgregluni vaksið seinastu fýra árini*

JOHN JOHANNESSEN

Talið av meldaðum innbrotum í 1999 var 122 sambært ársfrágreiðingini hjá løgregluni. Verður hetta samanborið við 1998, er talan um ein vøkstur á 6,1 prosent.

Hinvegin fekk løgreglan í 1999 184 fráboðanir um annan stuldur, og er hetta eitt fall á 4,2 prosent, um samaborið verður við 1998.

Hóast vøksturin á 6,1 prosent í talinum av innbrotum frá 1998 til 1999, heldur løgreglan onga orsøk vera at stúra. Í ársfrágreiðingini fyri 1999 vísir løgreglan á, at samanborið við seinastu seks árini, er talið av meldaðum innbrotum framvegis lágt, hóast talið er vaksið eitt sindur tey seinastu fýra árini.

Løgreglan vísir á, at orsøkin til stóra vøksturin av innbrotum í 1999 er, at talan er um eina røð av brotsverkum, ið er framd av nøkrum ávísum brotsmonnum.

Talið av stuldri annars er fallið niður á tað lægsta síðani 1993.

### Samlaða talið vaksið

Samlaða talið av innbrotum, stuldri og øðrum líknandi brotsverkum vaks frá 1998 til 1999 við 32,1 prosentum.

Løgreglan vísir tó á, at hóast munurin millum ymsu árini er viðhvørt er stórur, kann hetta tal tó metast at hava ligið á einum nøkulunda jøvnum støði tey seinastu fimm til seks árini.

Ársfrágreiðingin hjá løgregluni vísir í hesum sambandi á, ein eitt einstakt mál í 1999 var skrásett við 240 journalnumrum. Hetta hækkar munandi um talið av lógarbrotum í 1999.

Í 1999 vórðu skrásett 1.065 lógarbrot, og er hetta ein vøkstur á 5,6 prosent samanborið við 1998, tá talið var 1.008. Tó kann sigast, at veruliga talið av lógarbrotum í 1999 einans var 825. Talið 1.065 kom, eins og áður sagt, av, at eitt ávíst lógarbrot var skrásett við 240 journalnumrum. Tískil ber í roynd og veru til at vísa á eitt fall á 18,1 prosent í talinum av lógarbrotum frá 1998 til 1999.

### Meginparturin herverk

Talið av meldaðum herverkum var í 1998 324. Hetta tal er 2,1 prosent lægri, enn talið fyri 1998. Í 1989 var talið av herverkum heilt uppi á 538.

Hóast talið av herverkum er fallið, vísir løgreglan á, at herverk framvegis telja 30 prosent av øllum meldaðum lógarbrotum í Føroyum.

Talið av fráboðanum um brúksstuldur er fallið seinastu 12 áini. Í 1999 vórðu skrásettar 43 fráboðanir um brúksstuldur. Hetta er eitt fall á 39,4 prosent samanborið við árið fyri. Men talið av brúksstuldri er enn ikki komið á eitt lægri støði, enn tað var í 1995.

## Føroyskt bilamet

*Talið av skrásettum motorakførum var í fjør hægri enn nakrantíð*

JOHN JOHANNESSEN

Talið av skrásettum motorakførum í Føroyum var í fjør 18.843, og er hetta søguligt met.

Talið av skrásettum motorakførum fall brádliga frá 18.922 til 15.145 frá 1988 til 1994. Men síðani kreppan hasaði av, er talið aftur farið at vaksa, og seinastu fimm árini hevur talan verið um ein støðugan vøkstur, ið hevur ført til, at vit í fjørt settu met við 18.843 skrásettum motorakførum til eitt fólkatal á góð 45.000.

Í 1996, tá búskaparkreppan var við at hasa av, fór talið av eigaraskiftum sambært ársfrágreiðingini fyri 1999 hjá løgregluni aftur at vaksa fyri fyrstu ferð síðani 1992. Í fjør kom hetta tal upp á sama høga støði, sum í 1996, tá 5.439 motorakfør skiftu eigara.

### Eftirlit minkar um óhappini

Løgreglan sigur, at síðani endan av áttatiárinum er nógv orka nýtt til eftirlit av ferðsluni, og hevur hetta givið ógvuliga gott úrslit, um hugsað verður um, hvussu nógv talið av akførum er vaksið.

Í 1999 var talið av fráboðaðum ferðsluóhappum 1.330, og er hetta ein vøkstur á 6,4 prosent, samanborið við 1998. Men í hesum sambandi skal ikki gloymast, at talið av skrásettum bilum eisini er vaksið munandi.

Løgreglan sigur í ársfrágreiðing sínari, at talið av fráboðaðum ferðsluóhappum fall nógv frá seinast í áttatiárunum og fram til 1994, tá talið legið seg í eina fasta legu næstu trý árini.

Men síðani 1998 er talið vaksið frá 1.250 til 1.330 í fjør.

Hóast talið av ferðsluóhappum er vaksið seinastu árini, hevur gongdin verið ein onnur fyri talið av ákærum fyri rúsdrekkakoyring.

Frá seinast í áttatiárunum, tá løgreglan herdi eftirlitið, sást eitt fall í ákærunum fyri rúsdrekkakoyring fram til 1994, tá talið legði seg í eina nøkulunda fasta legu. Tó sæst eitt enn størri fall seinastu fáu árini. Í 1997 var talið av ákærum fyri rúsdrekkakoyring 170, í 1998 var talið 155 og í 1999 var talið 127. Hetta eru tøl, ið liggja lagt niðanfyri tey frá 1982 til 1993.




Nýtt ískoyti til skrokktryggingar

TRYGD Bilhjálp

petur & petur • 320870



# Manãna bilas caputo con Trygd no problemas

Tað er ikki altíð so stuttligt at standa uppsteðgaður uttanlands. Hvar fái eg hjálp, hvat kostar tað, og dugi eg at siga tað...?

Við **Trygd Bilhjálp** er "no problemas" - ring, og vit koma við hjálp.

**Trygd Bilhjálp** er eitt ískoyti til skrokktryggingina og fevnir m.a. um útreiðslur til starthjálp, veghjálp, kranabil og mekaniska hjálp á staðnum í sambandi við óhapp, motorsteðg ella líknandi.

Við **Trygd Bilhjálp** fært tú ókeypis hjálp nærum um alt Europa, tí Trygd samstarvar við Falck í Danmark.

Er títt tørn komið til at verða óheppin, skalt tú bert ringja til Falck, og tú fært hjálp.

**Trygd Bilhjálp** kostar einans 350,- kr. um árið, tá ið bilurin er yngri enn 6 ár, og 450,- kr. um árið, er hann eldri.

Um tú ikki longu hevur tryggjað bil tín hjá Trygd, so eru nú enn fleiri orsøkir til at gera tað.

Kom inn í eina av deildunum hjá Føroya Banka ella til Trygd og fá tær **Trygd Bilhjálp** - tað fer at loysa seg.

*...tí Trygd Bilhjálp fevnir eisini um Europa*

TRYGD

Tórsgøta 16 Postboks 44 110 Tórshavn Tel 31 16 77 Fax 31 72 11